gult cyan magenta svart

VI‹MERKING

Vi›merkingar til løgmannsrø›una 2000

Hetta er tri›ja løgmansrø›an í hesum samgonguskei›num. Undir normalum umstø›um átti ta› at veri› ein sigursalur løgma›ur, i› l‡sti gongdina hetta valskei›i›. Men so er ikki. Ta› ‡virskipa›a máli› at loysa úr ríkisfelagsskapinum hevur milt sagt gingi› av skri›uni. Samgongan má sta›festa, at ta› ber ikki til at byggja langtí›arpolitikk á løtustemning, tann løtustemning, sum valda›i á vári 1998.

Og burtur sæ› frá fullveldispartinum so l‡sir rø›an eina positiva gongd í samfelagnum. Og ta› fær illa veri› ø›rvísi›: Metfiskiskapur, fleirfalda›ir fiskaprísir, ein sanera› vinna og metlág renta. Men loysingarmáli› skuggar yvir tí annars positivu gongd. Tríggjar fer›ir hevur landsst‡ri› veri› til samrá›ingar í Danmark, og tríggjar fer›ir hevur fólki› siti› heima og krympa tær. Fyri fyrstu fer› hevur føroyingurin kent seg illa í Danmark, tí landsst‡ri› gjørdi okkum fyri skommum. Hetta er bæ›i galdandi fyri lesandi og fastbúgvandi ni›ri. Ein ólukkulig stø›a.

Fyri at skava út yvir ómegdina er fullveldispartin ein sminka› søga vi› ongum haldi í veruleikanum.

Ta› grefligasta dømi er, tá ein annars roknskaparkønur løgma›ur leggur avlop hjá landskassa og kommunum saman og setur upp ímóti blokkinum:

Blokkur 933 mill kr. minus avlop frá landi og kommunum 850 mill. kr. Hokus pokus, nu resta bara 83 mill kr. í at vera sjálvbjargin. Manipulatión av ringasta slag og onki or› um rentur og avdrøg upp á 4-500 mill kr.

Desperatión hevur merkt hetta seinasta ári›, sum annars átti at veri› merkt av optimismu. Grefligasta dømi› var, tá i› teir ætla›u at selja eina komandi olju. Tá stúrsa›i mangur føroyingur. Men danir bitu tíbetur ikki á hetta luftiga agni›. Og nú setur samgongan so fólksins ognir á sølulistan: Føroya Banka, Atlantsflog og Føroya Tele. Potentiellir keyparar: Den Danske Bank og Mærsk Air gníggja sær í lógvarnar.

Mi›øldin ver›ur av teim flestu mett sum ein døpur tí›. Og ikki uttan grund. Kongs og ognarbøndur saman vi› donskum prestum høvdu honds og hálsrætt yvir fólkinum.Teir áttu rættin til jør›ina, til bjørgini, til rekavi›in og til bátshald.

Okkara samfelag hevur vi› mi›vísari st‡ring frá borgarligum flokkum ment seg til eitt moderna› mi›aldarsamfelag, har nakrir fair útvaldir hava fingi› rættin til fir›irnar og ognarrættin til tann fisk, sum svimur í havinum. Fólksins ognir eru blivnar til spekulatiónsobjekt hjá einum n‡ggjum slagi av ognar- og kongsbóndum. Teir donsku prestarnir eru skiftir út vi› norskan og íslandskan kapital. Ein virkisfúsur unglingi hevur ongan livandi tjans í teimum traditionellu vinnunum, hevur hann ikki tann rætta pápan. Hann er dømdur at vera løntakari hjá teimum útvaldu. »Ma›ur skal sm›a sær eydnuna gó›a vi› teimum evnum, Skaparin gav«, er ikki galdandi í teimum størstu vinnunum longur.

Vinnumálasamfelagi› ætlar at or›a ein n‡ggjan fer›avinnupolitikk. Men eg mæli vinnumálast‡rinum at gloyma alt um fer›avinnu, so leingi matstovur ikki vilja ella megna at gjalda starvsfólki eina sømiliga løn. So leingi starvsfólk liva undir mi›aldarumstø›um, har arbei›sgevarin einvíst ásetur eina hungursløn, eigur onki at gerast frá almennari sí›u at menna eina vinnu,í› ikki vir›ir tey mest grundleggjandi starvsfólkarættindir. Arbei›spláss, i› ikki hava rá› at gjalda lønir, hava ongan tilverurætt.

Undir a›alor›askiftinum um landbúna› í vár eftirl‡sti eg visiónirnar hjá landsst‡rismanninum. Eg má sta›festa, at tær finnast ikki. Gó›ar tríggjar reglur er alt, i› landbúna›urin fær. Ta› er hugstoytt hjá teimum, i› fáast vi› hesa vinnu.

Undir vinnumálum lesa vit annars fleiri positiv signalir, sum vit megu fróast um. M.a. at ein kunningartøknipolitikkur skal or›ast. Hetta er ney›ugt, tí framtí›in kemur sum kunnugt ikki av sær sjálvari.

Parturin um tænastu- og tilfeingisdepil og parturin um handil og fídna› er eisini hugaligur lesna›ur. Ta› grør um gangandi fót. Ta› merkja vit eisini, sum liva í lokalsamfelagnum.

Hetta er onnur sjálvst‡rissamgongan í løgtingssøguni. Felags fyri bá›ar er, at vit koma ikki ein tumma á sjálvst‡rislei› hóast allar snildir og lokabrøgd frá samgonguni. Tann annars óhefta umsitingin er sett at skriva aggitatiónstilfar, propagandafaldarar eru sendir í hvørt hús í landinum upp á skattaborgarans rokning og fulltveldisheimasí›a hjá landsst‡rinum, sum hampafólk venda sær frá í andst‡gd. Men onki hjálpir. Fólki› er ikki vi›. Umstø›ur eru ikki til loysing. Bert loysingarmenn ganga í eini fantasiver›, me›an fjøldin er ótrygg og óttafull.

Nær vaknar fólkaflokkurin og nær vaknar gamla sjálvst‡ri›? Kanningar hava vist at veljaraskarin hjá hesum flokkum er komin ni›ur um bur›ardygt stø›i, me›an somu kanningar vísa, at ta› er sjálvst‡rislógin hjá javna›arflokkinum, fólki› vil hava. Vit sita vi› lyklinum til ta ríkisrættarligu skipan, veljarin ynskir, og bí›a bara eftir arbei›sbo›um.

Dan R. Petersen
Javna›arma›ur

Betri svøvn

BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær afturbut sendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.

Viðgerð,ið virkar ímóti:

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNETTERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

Sosialurin - 311820

Torbjørn gevur rangar upplýsingar

Nú løgmansrø›an var til vi›ger›ar á tingi, hev›i undirrita› forfall og kundi sostatt ikki taka lut í or›askiftinum. Men or›askifti› var› útvarpa›, so høvi› var at hoyra ta›.

Naka› i› fall mær fyri brósti, var tann frábo›an, í› Torbjørn Jacobsen bar fram, um at Almanna- og heilsuskúlin, i› skuldi ver›a í Havn, nú bráddliga skal ver›a á Tvøroyri. Samstundis seg›i hann, at eingi bo› framman undan vór›u givin um, hvar nevndi skúli skuldi ver›a. Henda seinna frábo›an hansara var ósonn og líti› sømilig fyri n‡valdan landsst‡rismann.

Eitt sindur um gongdina í málinum

Undirrita›i, i› sat sum landsst‡risma›ur undan Torbjørn J. leg›i lógaruppskoti› um Almanna- og heilsuskúlan á tingbor›. Undir 1. vi›g. seg›i eg frá, at ætlanin var at leggja skúlan í Havn so tætt samstarv fór at ver›a millum Sjúkrasystraskúlan og n‡ggja Almanna- og heilsuskúlan. Víst var› á nógvar fyrimunir vi› hesi ætlan - bæ›i undirvísingarliga og fíggjarliga.

Somu sjónarmi› bar eg fram á fundi at leggja skúlan á Tvøroyri, men tóktist ta› ikki at vera áhugi fyri tí.

Ta› løgna hendi á fundinum, at øll løgtingsumbo›ini í Su›urstreymoy uttan Finnbogi Ísakson, vildu hava skúlan at liggja uttan fyri Havnina og helst í Sandoynni.

Endaliga ni›urst›an gjørdist, at ætlan landsst‡rismansins, i› vardi av málinum um at leggja skúlan í Havn, var› tiki› til eftirtektar vi› tí ískoyti, at skei› i› skúlin fór at skipa fyri, vór›u eisini hildin uttanfyri Havnina. Full semja var› um ta›.

Lista- og handverkskúlin úr Klaksvík

Annars bo›a›i sami landsst‡risma›ur frá at Lista- og handverkskúlin skuldi leggjast í Sandoynna. Ta› er ein heilt ótrúliga løgin arbei›sháttur, at vit sum eru í sama flokki og í samgongu fyrstu fer› frætta um hetta av tingsins rø›arapalli. Fyrr hevur ta› havt stóran og avgerandi t‡dning at slík mál hava veri› umrødd í tingflokkinum. Henda si›venja er nú avtikin, skilji eg, og landsst‡risma›urin kann taka stø›u uttan at rá›føra seg vi› nakran.

Um Lista- og handverkskúlan er at siga, at klaksvíkingar hava lagt nógva orku í, at fingi› slíkan skúla stovnsettan.

Ætlar Torbjørn J. veruliga at taka henda skúla frá klaksvíkingum leggja hann a›rasta›ni í Føroyum? Hava Heini O. Heinesen og Karsten Hansen veri› vi› í hesum leiki? Eg fái meg neyvan at trúgva tí, kenni eg teir rætt.

Sjálvur haldi eg, at skúlin framhaldandi eigur at ver›a í Klaksvík, tí tey fólk i› higartil hava arbeitt vi› hesum skúla, hava prógva stórt dugnasemi og eiga at fáa møguleikan at halda fram.

Eftirskúlin

Tá i› lógin um eftirskúlar var› løgd fram, var› eisini nógv umrøtt, hvar ein slíkur skúli skuldi ver›a. Tingmanning Tjó›veldisfloksins tosa›i nógv um hetta mál, men skal eg ikki koma nærri inn á ta›, i› fór fram.

Eg skal ikki dylja yvir, at sjálvur havi eg hildi› og haldi, at Sandoyggin og Su›uroyggin høvdu veri› stak gó› stø›, at lagt slíkan skúla á. Men havast skal í huga, at talan er um ein sjálvsognarstovn, i› hevur sína serligu skipan og reglur at ganga eftir, i› m.a. sigur at ta› eru stigtakarnir, i› avgera hvussu skúlin skal skipast og somulei›is, hvar hann skal vera.

Men í lógaruppskotinum stendur somulei›is, at landsst‡risma›urin í skúla- og mentamálum kann taka stig til slíkan skúla. So her eru møguleikar.

Samanumtiki› skal ver›a sagt, at arbei›sháttur landsst‡rismansins í samband vi›, hvar skúlar skulu leggjast tykist rættiliga løgin. Mangir tingmenn høvdu ta› á or›i og ógva›ust um framfer› landsst‡rismansins. Eg kann bert leggja aftrat at eg teljist ímillum hesar, men eg vóni at landsst‡risma›urin tekur anna› skinn um bak, so samgongan ikki fær óney›ugar trupulleikar aftrat at dragast vi›.

Signar á Brúnni

VI‹MERKING

Sjálvst‡ristilgongdin og SvF-tí›indini

Undir vi›ger›ini av løgmansrø›uni í farnu viku gav undirrita›i sítt ískoyti til setning samgongunnar um fullveldi.

Uppskoti›, sum í høvu›sheitum sn‡r seg um at snara tilgongdini í málinum um fullan suverenitet, skal roknast sum eitt varligt íkast til loysn av málinum um n‡ggjan sáttmála millum Føroyar og Danmark. Eitt íkast til loysn, sum er í samljó› vi› samgonguskjali›.

Varliga útspæli› var ætla› at savna og undir ongum umstø›um at spja›a í sjálvst‡ristilgongdini. Uppskoti› var soljó›andi (brot endurgivi› úr rø›uni):

»Nú landsst‡ri› sta›festir, at vi› verandi samrá›ingargongd er skiftist›in ultimativt 4 ár, og at sáttmáli Føroyar og Danmarkar millum eftir hesum leisti hvørki eigur parlamentariskan meiriluta ella stu›ul millum manna, so er ney›ugt at tillaga samrá›ingaruppleggi› til henda veruleika, og, sum eg síggi ta›, so er ta› gjørligt uttan at sleppa málsetninginum í samgonguskjalinum.

Tí kundi ta› veri› eitt uppskot, at processin var› vend á høvdi›. Ra›fylgjan í tilgongdini um fullan suverenitet kann ikki vera avgerandi fyri, um máli› ver›ur egg ella ungi.

Ta› kundi veri› ein gongd lei›, at samantvinnanin av suvereniteti og skiftistí› var› li›a› sundur og landsst‡ri› so mi›jar eftir at gera sáttmála vi› suvereniteti sum endaliga málsetning.

Hetta kann fremjast, um sáttmálin Føroya og Danmarkar millum ásetir, at løgtingi› einsamalt hevur heimild at yvirtaka øll málsøki og at gjaldingin fyri hvørt málsøki sær ver›ur at gjalda av landskassanum so hvørt, sum yvirtiki› ver›ur og/ella valt ver›ur at gjalda fyri longu yvirtikin mál. Sostatt hev›i ta› veri› gjørligt hjá okkum at skipa fíggjarligu skiftistí›ina eftir tí áramáli, sum parlamentariski meirilutin metir at vera rætt, og hev›i hetta eisini sampakka› vi› setning landsst‡risins um at skipa skiftistí›ina eftir okkara fortreytum.

Vinnur slíkt uppskot frama og vilji er at yvirtaka málsøki fyri 50, 100 ella fleiri mio um árí› og skiftistí›in ver›ur samsvarandi (í øvugtari ra›fylgju) 4, 8 ella fleiri ár – so ver›ur ta› løgtingi› og í sí›sta enda føroyski veljarin, sum fer at hava endaligu avger›ina.

Hetta uppskoti› ella skipan gevur okkum ikki suverenitet frá fyrsta degi, men málsetningurin er grei›ur – stjórnarvald Føroya hevur málsræ›i á øllum yvirtiknum málum. So hvørt sum felagsskapurin landanna millum ver›ur tómdur fyri pengar, ver›ur minni og minni, i› for›ar fyri, at suvereniteturin gerst veruleiki, ger løgtingi› av at skipa Føroyar sum fullveldi. Slíkur sáttmáli er eisini í samsvar vi› setning samgongunnar og ver›ur eisini trupul hjá donsku stjórnini at vísa frá sær.

Veljarakanningar vísa eisini, at minst 2/3 av føroysku veljarunum taka undir vi› at hildi› ver›ur fast vi› setningin um fullan suverenitet – bara skiftistí›in er nóg long.

Sum stø›an hevur útvikla› seg, er ilt at síggja hvussu komi› ver›ur á mál, ver›ur ikki okkurt alternativ royntað.«

SvF fekk fekk handa› hetta broti› úr rø›uni, og var annars kunna› um innihaldi›, umframt, at vist var› á,

- at uppskoti› skuldi metast sum eitt positivt íkast til fullveldiskjaki›,
- at dentur var lagdur á at halda seg innanvert samgonguavtaluna, har máli› er at gera ein altjó›a-rættliga sáttmála millum Føroyar og Danmark
- og at uppskoti› ikki víkir frá málinum um fullan suverenitet.

Tí var undirrita›i sera bilsin og eisini vónbrotin, tá SvF fríggjakvøldi›, 4. august, í innslagnum l‡sti hetta sera vi›brekna mál solei›is (sv-tí›indini endurgivin vi› skrá›skrift, vi›merkingar frá undirrita›a vi› vanligari skrift):

- at Bjarni Djurholm gongur móti løgmanni í fullveldismálinum. Hetta er beint tvørturímóti og er tí púra burturvi›.
- at løgma›ur ikki vildi gera vi›merkingar til sjónarmi›ini hjá BjDj. Ein pástandur tikin úr leysum lofti. Stø›a løgmanns hev›i einki vi› sjónarmi›ini/-uppskoti› hjá undirrita›a at gera.
- at spurningurin er, um samgongan nú er um at klovna. Eisini leysatí›indi. Bæ›i uppskoti› hjá undirrita›a og stø›an hjá samgonguni undir or›askiftinum prógva ta› øvugta.
- at BjDj er ví› at seta kílar í samgonguna. Vísandi til á›urnevnda, er eisini her talan um ógrunda›an pástand.
- og at enda at insinuera, at BjDj kundi veri› limur í javna›arflokkinum. At hesin óvi›komandi spurningur var› settur avdúkar, at sjónvarpsinnslagi› var ætla› at vera ein sensatiónssøga.

Samanumtiki› var innslagi› í sjónvarpinum ein samansjó›ing av skeivum tulkingum og rongum tí›indum, sum grumsa›u fkasti› til loysn á høvu›smáli samgongunnar.

Ta› er sta›fest, at danska útspæli› um skiftistí› er ultimativt, og sostatt er vi› at læsa samrá›ingarst›una fasta. Harafturat fylgja danir væl vi› í politisku gongdini á løgtingi. Tí kundi tulkingin í sv-tí›indunum fríggjakvøldi› eisini leggja landsst‡rinum for›ingar í vegin í samrá›ingunum vi› stjórnina.

Sjálvsagt skuldi og kundi undirrita›i málbori› seg ø›rvísi í kritikkinum av sjónvarpinum – ta› ska›ar ongantí› at taka í egnan barm. Í hvussu so er eiga ábrei›slur av tingsins rø›arapalli at vera sakligar og mugu ikki fatast sum fjaldar hóttanir. Tí skal undirrita›i ásanna, at uppskoti› um ø›rvísi tilgongd í fullveldismálinum lutvíst var› forpurra› orsaka› av bersøgna or›alagnum um SvF.

Men tá hetta álvarsmál var› snara› so út av lagi í almennum tí›indabera, so var trupult at lata vera vi› at geva ilt av sær.

Ta›, at Starvsmannafelagi› metir, at innslagi› »var gjørt væl og grundiga av sjónvarpsfólki«, broytir einki vi› ta sannroynd, at tí›indini í SvF ikki samsvara› vi› veruleikan. Annars kann lesarin sjálvur gera sær metingar, um samsvar var millum tí›indini og uppskoti› hjá undirrita›a.

Í Degi og Viku fyrrakvøldi› var sama mál til umrø›u. Í hesi sending var› sjálvst‡ristilgongdin gjølliga l‡st í samsvar vi› tey sjónarmi›, sum undirrita›i undir vi›ger›ini av løgmansrø›uni leg›i dent á. Ta› er at fróast um. Bert spell, at hetta ikki eisini var› gjørt farna fríggjakvøld.

Vinaliga
Bjarni Djurholm

Samgongan hevur bert byr›ar at bjó›a føroyingum

Palliba skal gjalda 20 milliardir – umframt anna›.Ta› er Samgongunar »tilbo›« til føroyska skattgjaldaran.

Ein fer at ivast í um loysingarsamgongan umbo›ar føroysk áhugamál, i› teir annars eru valdir til. H. Hoydal endurtekur, at samgongan ætlar sær at bjó›a døgnum 20 milliardir krónur í skiftistí›ini. Peningur, i› føroyingar sjálvandi skulu gjalda afturat núverandi himmalhøgu skattum og avgjøldum. Men onki ver›ur nevnt í Løgmansrø›uni hvørja ávirkan ta› fær á skattarokningina hjá Palliba.

Vit vita nú, at onki skil er á tí politikki, i› núverandi samgonga fremur á ríkisrættarliga økinum. So líti› skil er á, at púrt onki ver›ur nevnt í Løgmansrø›uni um fíggjarligar smeitir vanligi føroyingurin fær av teirra ætlan.

20 milliardir+

Teir vita ta›, men tiga veruleikan burtur, vi› at manipulera veljaran dyggiliga. Høgni Hoydal hevur nú fleiri fer›ir nevnt, at danski skattgjaldarin fer at spara 20 milliardir krónur. Hann »gloymir« í sama føri at nevna, at føroyski skattgjaldarin má gjalda hesar 20 milliardir krónurnar.

20 milliardir afturat+

Ein búskapargrunn ætla teir at stovna. Í Hvítubók ver›ur nevnt, at renturnar at hesum grunni skulu vera á støddd vi› ríkisveitingina. Støddir á hesum grunni má tí ver›a álei› 20 milliardir krónur.

Ríkisveitingin, umlei› 1,5-2 milliardir krónur árliga, vilja teir av vi›. Føroyingar skulu tí gjalda hesa upphædd afturat árliga.

5-10 milliardir afturat +

Umframt skulu Føroyar útbyggjast uppá Heimast‡rismaner framyvir fyri milliardir. Ferjur, sjúkrahús, ellisheim, barnagar›ar, skúlar, tunlar undir sjógvi og landi, ferjur o.a. Aftur nógvar milliardir. Teir kalla ta› eina langtí›arætlan.

Ein pensiónsgrunnur uppá 15 % av lønini skal skipast.

Skattahækking ella lækking?

Sum rosinan í pylsuendanum nevnir løgma›ur nógv umtala›a skattalættan, i› samgongan eisini hevur í huga at fremja. Fyri, líkasum at undirstrika »seriøsitetin«, ver›ur nevnt, at skattalættin má fremjast »vi› varsemi«.

Álvaratos, hvat heldur løgma›ur, at føroyingar eru? Teirra uppskot fer at fordobla skatt føroyinga. Hví tiga teir vi› tí?

Rokningin fyri loysingina og teirra framtí›aríløgur fara komandi 10 árini at kosta eitt sta› ímillum 60 og 100 milliardir krónur.

Til samanbur› kan nevnast at seinasta kreppan, i› loysingarfólk fyri stóran part áttu, kosta›i var 13,6 milliardir sambart Caragata, og førdi vi› sær, at uml 8000 føroyingar fluttu av landi. Skal søgan longu endurtakast? Ta› eru jú teir somu, i› st‡ra fyri ein stóran part!

Loyniligt undirskot:

So hesafer› fer ta› møguliga at hepnast at oy›ileggja Føroyar heilt. Rokningina tiga teir vi›. Hana roynir samgongan at halda loyniliga – eins og teir eisini royndu at fjala samrá›ingarnar fyri føroyingum fyri kortum. Endamáli› er, at nakrir fáir skulu fáa hendur á oljuríkidømum, i› møguliga liggur fjalt undir havsins botni!

Føroyingar savnist:

Ta› er ney›ugt, at føroyingar nú savnast um at gera ríkisrættarligar broytingar, i› Sambandsflokkurin mælir til. Broytingar – i› merkja frambur› fyri allar føroyingar!

Vinarliga
Marjus Dam
løgtingsma›ur

KANÓN-TILBOÐ!

Til Danland

& 2 vaksin 2 børn í bili

1 vika í frítíðarbúð



Íroknað prísin:

Ferðin Tórshavn - Hanstholm og aftur v. bili í 4 koyggjukamari við handvaski. Hartil 1 vika í 2-verilsísbúð í Danland, Blokhus ella Ebeltoft.

Fráferðardagar:
13.08 ella 25.08

úr 5.995,-

SMYRIL LINE
Tel 31 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo